Samanlagda felagið, Faroe Seafood:

# Verður lýst til sølu til heystar

**Nevndarformaðurin í Framtaksgrunninum, Dagmar Joensen, sigur, at síðan í november í fjør, tá ið avgjørt varð at leggja P/F United Seafood og P/F Faroe Seafood saman, hevur verið arbeitt miðvíst við at samskipa raksturin av báðum feløgunum til eina vælvirkandi heild**

SAMANLEGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Samanleggingin av P/F United Seafood og P/F Faroe Seafood verður formliga samtykt á eykaaðalfundi 29. mars, sum er komandi týsdag.

Hesum boðar Dagmar Joensen, nevndarformaður í Framtaksgrunni Føroya, frá í tíðindaskrivi.

- Vit hava samtykt, at samanlagda felagið, P/F Faroe Seafood, verður sett til sølu í seinasta lagi, 24. oktober 2005.

Í skrivinum vísir nevndarformaðurin á, at Framtaksgrunnurin og P/F United Seafood í eina tíð hava arbeitt við at fyrireika sølu av P/F United Seafood.

- Hetta arbeiði hevur eitt nú fevnt um tillagan av teimum einstøku virkjunum - við tí endamáli at betra sølumøguleikarnar og um gerð av tilfari, ið skal nýtast sum grundarlag fyri at fara víðari við tilgongdini og søluni.

Dagmar sigur, at síðan í november í fjør, tá ið avgjørt var at leggja P/F United Seafood saman, hevur verið arbeitt miðvíst við at samskipa raksturin av báðum feløgunum til eina vælvirkandi heild.

- Henda samanlegging verður so formliga samtykt á eykaaðalfundi komandi týsdag, og navnið á framhaldandi felagnum verður tá P/F Faroe Seafood.

Hon sigur, at tillagingarnar á einstøku virkjunum og samskipanin av rakstrinum av báðum feløgunum er nú komið so væl áleiðis, at grunnurin hevur samtykt, at samanlagda P/F Faroe Seafood í seinasta lagi, 24. oktober 2005, verður sett til sølu.

- Í tíðarskeiðnum fram til, at samlaða fyritøkan verður lýst til sølu, verður endaliga sølutilfarið gjørt liðugt, sigur nevndarformaðurin.

Dagmar Joensen leggur aftrat, at sølan verður skipað í samráð við Corporate Finance-deildina hjá KPMG og framd eftir einum leisti sum ger, at allir áhugaðir keyparar fáa møguleika at bjóða upp á partabrøvini í felagnum.

## Ókent handrit eftir William Heinesen á uppboðssølu

**Handritið til eina skaldsøgu eftir William Heinesen, sum ongantíð varð givin út, er nú sett á uppboðssølu hjá Bruun-Rasmussen Kunstauktioner. "Den yderste tid" er heitið á skaldsøguni frá 1941, sum forlagið Levin & Munksgaard vrakaði, men sum nú verður mett at vera 40.000-50.000 krónur verd.**

RÚNAR REISTRUP

**Keypmannahavn:** William Heinesen royndi í 1941 at fáa handritið til skaldsøguna "Den yderste tid" útgivið í bók. Men rithøvundin Otto Geldsted, sum tá var redaktørur á forlagnum Levin & Munksgaard, ið áður hevði útgivið fleiri av hansara handritum, helt ikki, at skaldsøgan fór at hava almennan áhuga og vrakaði tískil handritið.

Helst hevði sami Geldsted havt eina aðra áskoðan, um hann skuldi tikið støðu til sama handrit í dag, nú William Heinesen verður viðurkendur sum eitt av mætastu skøldum í Norðurlondum, og á Bruun-Ramussen Kunstauktioner meta tey eisini, at handritið er bæði málsliga og listarliga vert at geva út.

Fyrstu ferð almenningurin hoyrdi um handritið var í 2003, tá Jess Jessen, stjóri á Frederiksberg Antikvariat, sum hevði handritið í varðveitslu, ætlaði at geva tað út í bók.

Orsøkin til at ókenda handritið hjá William Heinesen nú er sett til sølu er at eigarin av Frederiksberg Antikvariat, ríkmaðurin og bókasamlarin Bjarne Saxhof, herfyri andaðist, og sambært arvaskjali hansara skuldu allar bøkurnar seljast á uppboðssølu. Fyrsta uppboðssølan yvir bøkur Saxhofs varð í november í fjør. Tá vóru eisini nakrar føroyskar bøkur seldar, millum annað enska útgávan av bókini Færoe, & Færoa Reserata hjá Lucas Debes, sum kom út í 1676.

Handritið til skaldsøguna "Den yderste tid" verður selt á uppboðssøluni hjá Bruun-Rasmussen í Bredgade í Keypmannahavn týsdagin 19. apríl.

Mett verður at bøkur Saxhofs samanlagt fara at verða seldar fyri eina trýsiffraða milliónaupphædd.



*Vrakaða handrit William Heinesens verður selt 19. apríl.*
*Mynd: Bruun-Rasmussen Kunstauktioner*

# - Eitt páskaminni fyri lívið

**Ein toftagenta er millum næmingarnar á PVE eftirskúlanum í Mariager, sum fyri stuttum hava verið í Kenya og sum á páskum eru í Føroyum, har teir fara at luttaka við fleiri páskatiltøk. – Eg vóni at vitjanin verður eitt minni fyri lívið, sigur 17 ára gamla Guðri Tausen**

SKÚLAVITJAN
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Skúlavitjan:** Nógvir føroyskir ungdómar hava millum ár og dag verið á donskum eftirskúlum, og viðhvørt hava teir saman við floksfeløgunum vitjað í Føroyum.

Nú á páskum vitjar ein 10. flokkur frá PVE eftirskúlanum í Mariager - áður Pinsevækkelsens efterskole - í Føroyum. Tey koma henda vegin skírisdag, og tey fara avstað aftur týsmorgunin eftir páskir.



*Guðri Tausen av Toftum er júst afturkomin av ferð í Afrika. - Á slíkari ferð verða nógvir lutir settir í nýtt ljós. Ikki minst tá ið tú ert eygnavitni til neyðina, sum er gerandisdagur hjá so nógvum, sigur hon. Saman við flokki sínum á donskum háskúla er hon nú á vitjan í Føroyum*

Millum næmingarnar er 17 ára gamla Guðri Tausen av Toftum. Í flokkinum eru seytjan næmingar og tríggir lærarar koma saman við teimum henda vegin.

Undir vitjanini skal flokkurin luttaka í opið hús tiltaki á samfelagsstevnuni í ítróttarhøllini í Runavík langa fríggjakvøld. Leygarkvøldið skulu tey luttaka á páskastevnuni í Kelduni í Skálafirði, og fyrrapartin páskadag skulu tey vera við á møtinum í Lívdini í Hoyvík.

### Við lív og sál

Danskir skúlanæmingar, og ikki minst teir á eftirskúlum ferðast ofta og nógv. Ferðin til Føroya er ikki tann fyrsta hjá hesum flokkinum í hesum skúlaárinum.

Í februar vóru tey í Afrika, har tey í tvær vikur vitjaðu skúlar og hjálptu børnum, sum eru heimleys og tískil liva so at siga á gøtuni. Ferðin var partur av vallærugreinini, sum tey kalla 10+.

Farið varð úr Danmark 3. februar. Málið við ferðini var at stuðla danska trúboðaraparinum Súsonnu og Leif Madsen í teirra arbeiði.

Tey hildu til í Nakuru, sum er ein av stóru provinsbýunum. Har vitjaðu tey skúlar og luttóku í barnaarbeiði. Nøkur hjálptu til við at byggja eina kirkju í einum býi, sum eitur Eldoret.

Undan fráferðini úr Danmark høvdu næmingarnar fyrireikað seg í fleiri mánaðir í at venja dukkuteatur, dans og drama, sum tey á ferðini nýttu sum amboð at boða kristna boðskapin.

Í vikuskiftunum vitjaðu næmingarnir lokalar kirkjur. Tey luttóku og vóru eisini eygnavitni til, hvussu afrikanararnir leggja lív og sál í, tá ið teir eru til gudstænastu og ikki minst, tá ið teir syngja.

Høvið var eisini at vitja í eini av tiltiknu tjóðarparkunum í Kenya. Úr bussinum sóu tey villu djórini, og í hesum sambandinum vitjaðu tey eisini eina masai bygd. Stolti ættbólkurin, sum er kendur fyri litføgru búnarnar og prýðislutirnar livir og húsast framvegis, sum fólk á okkara leiðum gjørdu fyri nógvum hundrað árum síðani.

### Eygnavitni

Fyri at fíggja ferðir sum hana til Kenya og nú til Føroya arbeiða næmingarnir á PVE eftirskúlanum nakrar tímar um vikuna á verksmiðju, sum framleiðir leikur.

- Eg havi fingið ógvuliga nógv burturúr ferðini til Afrika. Á slíkari ferð verða nógvir lutir settir í nýtt ljós. Ikki minst tá ið tú ert eygnavitni til neyðina, sum er gerandisdagur hjá nógvum í Afrika.

- Her hugsi eg serliga um børnini á gøtuni, sum vit hittu og tosaðu og spældu við, sigur Guðri Tausen.

Eingin av floksfeløgum hennara hevur verið í Føroyum áður.

- Og tí vóni eg, at vitjanin her á páskum fer at vera eitt minni fyri lívið hjá teimum, sigur 17 ára gamla toftagentan.

KOYRIKORT
Nýtt teoriskeið byrjar mánadagin 4.apríl
KOYRISKÚLIN
v/Árna Andreasen
Telefon: 222470 & 318779